# Eg eri komin til rætta landið



**- Sjálvandi er munur á Washington og Tórshavn, men Ísland og Føroyar hava eitt serligt samband, sum gongur langt aftur í søguna. Eg gleði meg at búgva og arbeiða her í Føroyum, sum hava eina einastandandi náttúru og eitt serstakt fólk. Mínir frítíðar áhugar eru millum annað gongutúrar í náttúruni og at fiska, og ríkir møguleikar eru fyri báðum her, sigur nýggi íslendski aðalkonsulin í Føroyum, Albert Jónsson**

SAMRØÐA
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*
*Myndir: Álvur Haraldsen*

Albert Jónsson byrjaði sína embætisleið sum politiskur ráðgevi hjá íslendska forsætismálaráðharranum, og arbeiddi á skrivstovuni hjá forsætismálaráðharranum frá 1991.

- Tá var David Oddson forsætismálaráðharri, og eg arbeiddi saman við honum í 13 ár sum ein av hansara ráðgevum, sigur Albert Jónsson.

Tá gjørdist David Oddson uttanríkismálaráðharri, og Albert Jónsson fylgdi við Oddson yvir í uttanríkismálaráðið.

- Hetta var í 2005, og tá gjørdist eg ambassadørur og limur av íslendsku uttanríkistænastuni, sigur Albert Jónsson.

Hann virkaði sum serligur ráðgevi hjá David Oddson, meðan hesin var uttanríkismálaráðharri, og hann helt fram í hesum starvi eisini eftir at Geir H. Haarde tók við sum uttanríkismálaráðharri. Haarde gjørdist eisini formaður í Sjálfstæðisflokkinum, tá David Oddson legði frá sær.

Albert Jónsson fylgdi so aftur við Geir H. Haarde yvir í forsætismálaráðið, tá hesin gjørdist forsætismálaráðharri á sumri í 2006. Har var hann so í nakrar fáar mánaðir.

Men áðrenn Albert Jónsson kom inn í politiska umhvørvið, starvaðist hann sum tíðindamaður í íslendska útvarpinum og sjónvarpinum. Hann var eisini leiðari fyri einum lítlum serfrøðingabólki (think-tank) innan uttanríkispolitikk og altjóða viðurskifti. Somuleiðis var hann í mong ár adjunktur á íslendska universitetinum í Reykjavík, har hann undirvísti í altjóða politikki.

## Gjørdist ambassadørur

Starvið í uttanríkismálaráðnum og síðani í forsætismálaráðnum førdi til, at Albert Jónsson fekk møguleikan at gerast ambassadørur Íslands í USA.

- Hetta var ógvuliga spennandi, og eg var har yviri í einum sera áhugaverdum tíðarskeiði. Eg fylgdi valstríðnum í fjør og upplivdi, at Obama varð valdur til forseta, og tað var bæði spennandi og áhugavert, sigur Albert Jónsson.

Hann sigur víðari, at USA er eitt ógvuliga dynamiskt samfelag, og politikkurin har yviri er ógvuliga áhugaverdur. Og uttanríkis- og trygdarpolitikkurin hevur sjálvandi stóran týdning í heiminum.

- Washington er eisini ein sera spennandi býur, við hópinum av stórum serfrøðingabólkum, fylkingum og stjórnarorganisatiónum. So tað var ein ógvuliga góð og spennandi tíð eg hevði har, sigur Albert Jónsson.

Hann upplivdi sum ambassadørur tvær hendingar, sum hava havt og framhaldandi fara at hava eina sera stóra ávirkan, ikki bert á amerikanarar, men eisini á allan heimin. Talan var um forsetavalið, sum omanfyri nevnt, men eisini um upprunan til alheims fíggjarkreppuna, ið jú sum kunnugt byrjaði við sonevndu subprim kreppuni á amerikanska bústaðarmarknaðinum.

- Fíggjarkreppan er sjálvandi eitt serligt fyribrigdi í USA. Tað var áhugavert at síggja, hvussu skjótt stjórnin reageraði, og hvønn veg farið var. Man valdi jú at spræna risastórar upphæddir inn í búskapin frá almennari síðu, og tað er ógvuliga áhugavert í amerikanskum samanhangi, sigur Albert Jónsson.

- Og hvat viðvíkur valkampinum var hann bæði áhugaverdur og spennandi. Obama gjørdist jú forseti undir sera stórum vónum, samstundis sum landið stendur framman fyri risastórum avbjóðingum. Eg væntí, at tað fer at verða trupult hjá honum at loysa teir sera stóru trupulleikar, sum standa honum fyri framman. Men hann er væl umtóktur, hevur momentum og eg rokni við, at hann hevur ein góðan møguleika at basa trupulleikunum. Hann er ógvuliga imponerandi, sigur Albert Jónsson.

## Føroyar okkum næst

Tað verður ofta víst til, at amerikanska fólkið fyltist við vón, tá Kennedy varð valdur og tók við forsetaembætinum í 1961, og sama vón tykist á mangar mátar at hava fylt amerikanska fólkið aftur nú, tá Obama hevur tikið við.

- Ja, nú kann eg sjálvandi bara tosa generelt um hetta, men tað er rætt, at tað eru mong, sum hava sammett tíðina nú við Obama, við tíðina, tá Kennedy tók við forsetaembætinum. Talan er eisini hesaferð um ein ungan, vælumtóktan forseta og tað kennist, at broytingar eru í luftini, og so mugu vit bara síggja, hvat veruleikin er, og hvat framtíðin ber, sigur Albert Jónsson.

Og framtíðin hjá Alberti Jónssyni er so her í Føroyum, í hvussu er nøkur fá ár fram. Men hvussu er so at flyta úr milliónabýnum Washington, høvuðsstaðnum í heimsins maktmiklasta landi, til Tórshavn, ein av heimsins minstu høvuðsstaðum?

- Ja, eg gleði meg jú til tíðina her í Føroyum. Sjálvandi er tað púra hvør sítt at vera í Føroyum og at vera í USA, men sjálvt um tað hevur sínar fyrimunir at vera í USA, so hevur tað nakrar øðrvísi fyrimunir at vera her í Føroyum. Fyri tað fyrsta eru viðurskiftini millum Ísland og Føroyar heilt serlig, tætt og góð, í veruleikanum einastandandi eftir okkara meting, sigur Albert Jónsson.

Hann vísir til bæði mál, mentan og søgu.

- Einki land stendur okkum so nær sum Føroyar. Viðurskiftini landanna millum eru elligomul og sterk, men eisini dynamisk og eg vóni, at eg í mínari tíð sum konsul her kann verða við til at gera bondini enn sterkari og tættari enn tey nú eru, sigur Albert Jónsson.

At bondini eru sera tøtt landanna millum vísir seg eisini aftur í, at londini hjálpa hvørjum øðrum, tá á stendur, og hetta vísti seg í verki aftur í fjør heyst, tá Føroyar bjóðaðu íslendingum eitt lán á 300 milliónir í sambandi við sváru fíggjarkreppuna, sum Ísland kom í í oktober í fjør.

- Og tað er nakað, sum vit íslendingar ikki gloyma, sigur Albert Jónsson.

